# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

26. november fingu Frida S. Mouritsen og Jónleif Augustinussen, Vágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3530 gr.

26. november fingu Sigga Jóanesarson og Regin Brattaberg Absalonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3625 gr.

26. november fingu Osla Dahl og Niclas Djurhuus í Hoyvík eina dóttur.

29. november fingu Dorit og Esbern Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 5400 gr.

1. desember fingu Diana Heinsen, Skála og Høgni Nielsen, Fámjin, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3850 gr.

1. desember fingu Siri Ann og Petur Eli Persson, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3300 gr.

1. desember fingu Nomi og Jonas á Stongum, Norðskáli, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3950 gr.

1. desember fingu Guðrun Olsen og Poul Adrian í Homrum, Kollafjørður, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3575 gr.

2. desember fingu Joan Evi Johannesen og Mortan Mohr, Sandavágur ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

2. desember fingu Margit B. Nielsen og Jóhan Ziskason, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3375 gr.

3. desember fingu Gunri E. og Torkil Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4200 gr.

3. desember fingu Maria Gunnleivsdóttir Hansen og Eyðfinn A. Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

4. desember fingu Eydna Skaale og Ragnar við Streym, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3700 gr.

5. desember fingu Maria Brøðraberg og Leivur Rubeksen, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2900 gr.

6. desember fingu Hanna F. og Ásmundur Hansen, Søldafjørður, eina dóttur. Hon var 50 cm. langur og vigaði 3600 gr.

7. desember fingu Elsa av Reyni og Marni Dam, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

# Minningarorð um Ann Larsen Lechuga

**f. 02.07.59 d. 04.11.05**

Góða Ann

At jólabrævið til tín í ár verður skrivað sum eini minningarorð er púra ófatuligt fyri meg. Hóast tú búsettist uttanlands, tá ið tú var 16 ára gomul, hevur tú altið vitjað heimaftur við jøvnum millumbilum, og sambandið okkara millum slitnaði ongantíð.

Vit vóru systkinabørn, og vinkonur hava vit verið, alt eg kann minnast. Vit avgjørdu, at hvar enn í heiminum, vit fóru at festa búgv, so skuldu vit skriva til hvørja aðra í hvussu so er einaferð um árið, nevniliga á jólum. Og vit hildu orð. Eftir lokna útbúgving sum korrespondentur í sponskum og enskum, giftist tú einum spanióla, og flutti til Spania at búgva í nøkur ár. Her átti tú sonin Einar. Tá ið Einar var 6 ár, fluttu tit aftur til Danmarkar, og nøkur ár seinni fingu tit børnini Thor, Liv og Mei.

Tú arbeiddi sum korrespondentur tey fyrstu árini, ein part av tíðini í kendu fyritøkuni Berlitz. Men tá børnini so komu høvd í høvd, var tú heima eitt skifti, og fór so at arbeiða á skrivstovuni í einum skúla.

Vit báðar hava altíð dámt væl at skriva brøv, og vit høvdu pennavinir víða um í Europa. Tú dugdi so sera væl at skriva, og tín áhugi fyri at læra fremmand mál, hevur altíð verið stórur. Tí gleddi eg meg á hvørjum árið, tá ið jólabrævið frá tær fór at koma. Hóast nógv ár í útlegd, skrivaði tú so væl føroyskt sum nakar, og stavsetiningin var sjálvandi framúr. Tú fylgdi væl við teimum nýggju føroysku orðunum, og vildi hava at vita hvaðani tey stavaðu frá, hvussu tey stavaðist o.s.fr.

Men so í jólabrævinum í fjør, skrivar tú, at tú kennir teg so móða og hevur blóðmangul. Tú skal til læknan í januar til nærri kanningar, men tú heldur ikki hetta hava nakað upp á seg - man fara at ganga yvir. Tó soleiðis var ikki. Fyrst í februar komu skelkandi boðini: Krabbi í tarmunum, sum tiðanverri hevði breitt seg til livrina.

Tá ið eg var og vitjaði teg í maimánað var tú longu álvarsliga merkt av sjúkuni, og vit vistu báðar, at hetta var allarhelst síðstu ferð vit sóust. Vit tosaðu um leyst og fast, tó serliga um góðu og tryggu barnaárini á Tvøroyri. Hóast tína ringu støðu, var tað eitt ið lá fremst í huganum: Hvussu kann eg tryggja mínum børnum eina góða framtíð? Tú hevur altíð verið sterk og røsk til at taka avgerðir, og hetta kom tær til góðar í hesi sváru tíð. Tað er alla æru vert, so nógv ið tú fekk av skafti, hóast tú var so álvarsliga sjúk. Størsta løtan mundi allarhelst vera, tá ið dótturin Liv varð úttikin til at koma á kenda Sankt Annæ`s skúlan, ið serliga er ætlaður børnum við musikalskum evnum.

Henda dagin ringdi tú heim, og segði at tú hevði klárað at verið við til fyrsta skúladagin hjá henni, og hvussu væl móttikin tit vóru.

Góða Ann bert 3 mánar eftir hetta, er tú ikki ímillum okkum meira. Tú sum altíð hevur verið so sterk og lívsglað, og hevur havt so sera góða heilsu. Vit standa eftir spyrjandi. Hví skuldi tú verða tikin burtur frá manni og fýra børnum í aldrinum 7,9,12 og 22 ár? Svarið fáa vit ikki her, men tíðanbetur sleppa vit at liva í vónini um, at ein dag skulu vit síggjast aftur í tí staði har ongi tár, sjúka ella deyði skulu vera.Tað er gott at vita.

Góða Ann, takk fyri allar tær góðu og hugnaligu løturnar ið vit hava havt saman. Tú fer altíð at eiga eitt pláss í mínum hjarta.

**Katrin**

# Alexander Samuelsen 50 ár



Í morgin, leygardagin 10. desember, verður Alexander Samuelsen í Havn 50 ár. Hann er roknskaparleiðari í Tryggingarfelagnum Føroyar, og hann hevur í mong ár verið at hoyrt í Útvarpinum, har hann serliga hevur gjørt sendingar um andaligan sang og tónleik.

Alexander er havnarmaður. Barnaheimið er í Marknagili, og Alexander bygdi við síðuna av hjá foreldrunum og á trøðni hjá teimum. Foreldrini eru Jenny og Tórolvur Samuelsen. Tey eru bæði fødd í 1928. Hon er ættað úr Norðragøtu, og hann er úr Havnini. Alexander er einkarsonur teirra.

Eftir studentsprógvið í Hoydølum í 1975, fór Alexander at læra í Føroya Banka. Í 1978 fór hann til grannskoðaravirkið hjá Carl Vilhelm Weihe. Í hálvt annað ár frá 1985 var hann á Saltsøluni, og frá 1987 og fram til í 2000 hevði hann saman við barndómsvininum Óla Regini Hansen grannskoðaravirkið HanSam. Seinastu fimm árini hevur Alexander verið roknskaparleiðari í Tryggingarfelagnum Føroyar. Tey eru í alt seks starvsfólk í tí deildini.

Meðan Alexander var í bankanum, gekk hann í handilsskúla, og árini hjá Carl Vilhelm Weihe leyk hann merkonomútbúgving í revisjón á Føroya Handilsskúla, og tá varð hann eisini skrásettur grannskoðari.

Tað nógva av frítíðini nýtir Alexander í Ebenezer, har hann seinastu umleið trettan árini hevur havt kassan og roknskaparligu viðurskiftini um hendur.

Alexander var sunnudagsskúlalærari í meiri enn tredivu ár, og hann loysir framvegis av í sunnudagsskúlanum. Síðani 1972 hevur Alexander verið í sangkórinum, har hann tað nógva av tíðini hevur havt umsitingarligu ábyrgdina.

Í 1978 var hann ein av teimum, sum fóru at royna seg í dupultkvartett, og teir í Dupultkvartettini í Ebenezer hava verið drúgvir og trúgvir. Teir hava sungið í Ebenezer og øðrum samkomum. Teir hava umboðað almennu myndugleikarnar, og teir hava mangan í sambandi við serlig høvi - bæði í gleði og sorg - sett dám á við sínum avbera vakra sangi. Hetta hava teir gjørt kring oyggjarnar og eisini í øðrum londum, eitt nú í Íslandi, Danmark og Grønlandi.

Alexander giftist í 1976 við Súsannu fødd Joensen og ættað úr Klaksvík. Foreldrini hjá henni eru Jona, sum doyði í 2002, og Malvinus Joensen. Tey eru bæði ættað úr Klaksvík.

Súsanna og Alexander eiga trý børn. Tórolvur, sum er føddur í 1976, Jenny fødd í 1981 og Alexander, sum er føddur í 1989. Jenny er gift Sveini í Heiðunum úr Saltangará. Tey eiga dóttrina Súsonnu. Jenny býr í Keypmannahavn, og Tórolvur og Alexander búgva í Havnini.

Í frítíðini hevur Alexander, sum er ógvuliga virkin, røkin og nágreiniligur, eitt nú fingist við at gera útvarpssendingar. Hann hevur gjørt Gospelløtur, Meðan hildið verður heilagt og Í víngarðinum, sum hann ofta og við góðum hegni og hugflogi legði nógva orku í. Seinastu tíðina hevur hann av og á verið at hoyrt á Rás 2, har Evangeliska Røddin ger sunnudagssendingina Kelduvaðið.

Súsonnu og Alexanderi dáma væl at ferðast, og tey hava ofta ferðast uttanlands og ikki so sjáldan saman við foreldrum hansara, sum tey búgva undir liðini á, og sum tey hava so ógvuliga nógv við at gera.

Føðingardagin er tað opið hús í Pálsstovu frá á middegi og inntil klokkan fimm.

**J**

## Tónleikur og jól í Havnar Kirkju

JÓL

Tónleikur og jól hóska væl saman, og í seinru helvt av desember fara ymisk tónleikatiltøk fram í Havnar kirkju.

Sunnudagin 11. desember kl 11 er gudstænasta, har Kristiliga Sangkórið luttekur við síni jólaskrá.

Sama dag kl. 14 er familjugudstænasta, har Barnakórið í Meinigheitshúsinum luttekur við sangi og Luciagongu.

Leygardagin 17. des. kl 11.30 verður Jólamatiné, sum Konsertfelagið skipar fyri. Tórshavnar Manskór, Blásikvintettin Kinkve, Ungdómsstrúkiorkestrið og solosangur.

Sama dag kl. 16 skipar felagið Javni fyri gudstænastu fyri menningartarnað, sum luttaka.

Sunnudagin 18. des. kl 11 er gudstænasta, har Dreingjakórið Undir Brúnni syngur.

Sama dag kl 20 er Jólakonsert, har næmingar Musikkskúlans spæla, og Gentukórið í Havnar kirkju syngur.